# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Gunnbjørg Rubeksen:

## Lagt frá sær á Realinum

**MÓTTØKA**
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 1. desember 2006 var móttøka á Føroya Realkreditstovni, ella Realinum, í sambandi við, at Gunnbjørg Rubeksen, sum hevur starvast á stovninum í gott 35 ár, legði frá sær sum 67 ára gomul.

Undir móttøkuni vóru familja, vinir og mong av teimum sum dagliga samstarva við Realin komin saman fyri at heilsa upp á Gunnbjørg, nú hon gevst á stovninum. Óli Heinesen, stjórnarlimur, og Osmund Justinussen, umboðsnevndarlimur í Realinum, hildu røðu fyri henni.

Gunnbjørg hevur arbeitt undir fleiri ymiskum stjórum. Hetta hevur sjálvandi sett stór krøv til starvsfólkini. Realurin og prísráðið høvdu skrivstovu saman í mong ár.

Realurin hevði 50 ára stovningardag í fjør, so Gunnbjørg hevur verið á stovninum meginartin av tíðini, stovnurin hevur verið til. Sum tað varð sagt undir móttøkuni hevur Gunnbjørg altíð verið eitt álitisfólk. Hon var eisini sjálv verið virkandi leiðari á stovninum eitt tíðarskeið.

Gunnbjørg, f. Jacobsen, er ættað av Skála, og er gift við Hendriki Rubeksen, politisti. Tey eiga døturnar Lisu og Honna, og barnabørnini eru 6 í tali.

Gunnbjørg arbeiddi sum skrivstovukvinna hjá P/F Poul Hansen í fleiri ár. Eitt tíðarskeið, meðan Hendrik lærdi til politist, arbeiddi hon eisini á skrivstovu í Danmark.





*Gunnbjørg saman við manninum Hendriki Rubeksen og ommusynunum Rógva og Hanus*

*Óli Heinesen, stjórnarlimur í Realinum, handar Gunnbjørg Rubeksen ein málning, hjá Zacharias Heinesen av Oyndarfirði, sum gávu frá stovninum*



*Gunnbjørg og Birgir Simonsen, fyrrverandi sýnsmaður hjá Realinum*



*Osmund Justinussen, umboðsnevndarlimur í Realinum*



*F.v.: Elvira Poulsen, Sólvá Dam, einkjan eftir Atla Dam, sála, sum var dagligur leiðar á Realinum, og Gunnbjørg Rubeksen*



*Starvsfólk á Realinum, f.v.: Leivur Michelsen, dagligur leiðari, Elvira Poulsen, Gunnbjørg Rubeksen og Egil Simonsen, sýnsmaður*